# Álvarslig læknakreppa í Suðuroynni um fá ár

**Tað er stórur vandi fyri at Suðuroyggin kemur at liggja í læknaloysi um fýra ella fimm ár**

LÆKNANEYÐ
*Áki Bertholdsen*

– Um nøkur heilt fá ár kemur Suðuroyggin í eina álvarsliga læknakreppu.

Tað fingu løgtingsmenn at vita, tá ið teir vóru á ferð í Suðuroy í farnu viku.

Á ferðini fóru teir fyrst yvir á Suðuroyar Sjúkrahús, har Ronnie Midjord, umsjónarmaður á sjúkrahúsinum og tveir av læknunum, Knud Steinø, yvirlækni og Karl Johan Fossá, kommunulækni greiddu teimum frá viðurskiftunum á Suðuroyar Sjúkrahúsi og heilsustøðuni í Suðuroynni annars.

Og teir duldu ikki fyri, at størsti trupulleikin á hesum økinum í Suðuroynni, er, at tað er so ómetaliga trupult at fáa læknar í oynna, bæði kommunulæknar og læknar til sjúkrahúsið.

Læknarnir søgdu, at heilsustøðan hjá Suðuroyingum er líka góð, sum hjá føroyingum annars.

– Okkara størsti trupulleiki er at fáa læknar í oynna og um fýra ella fimm ár koma vit í eina stóra læknakreppu, segði Knud Steinø, yvirlækni.



*Knud Steinø er einasti fasti yvirlækni á Suðuroyar Sjúkrahúsi og tá ið hann fer frá um kanska fýra ella fimm ár, er vandi fyri veruligari læknakreppu á Suðuroyar Sjúkrahúsi*

### Neyðugt við tilbúgving

Hann segði, at Sjúkrahúsið var sloppið so nøkunlunda undan sparingum, uttan í fjør og hann var ógvuliga spentur uppá uppskotið til fíggjarlóg fyri næsta ár, sum skuldi leggjast fyri tingið í gjár.

– Tað tykist sum um tað ikki eru øll, sum skilja, at á einum lítlum sjúkrahúsi kostar tað at hava eina skipaða tilbúgving til reiðar, tí tað eru útreiðslur, sum ikki kunnu rørast.

Hann vísti á, at eisini í Danmark verður tosað um at leggja sjúkrahús niður, men í Føroym er støðan júst tann øvugta av tí, hon er í Danmark.

– Í Danmark eru tað akuttar móttøkudeildir, ið verða niðurlagdar. Á Suðuroyar Sjúkrahúsi eru tað júst tað manningin, ið skal veita bráneyðuga hjálp, ið størsti tørvurin er á.

– Standa vit við einum sjúklingi, har stað stendur um lív ella heilsu, nyttar tað onki at vit næsta ár fáa ein Smyril, ið siglur eitt sindur skjótari enn hesin, tí Landssjúkrahúsið er akkurát líka langt burturi fyri tað og tí er tað so neyðugt við einari tilbúgving í Suðuroy, sum kann veita bráneyðuga viðgerð.

### Skal vera meiri lokkandi

Sjálvur hevur Steinø verið lækni á Sjúkrahúsinum í 20 ár.

– Ein part av tíðini hava vit verið so væl fyri, at vit hava verið tveir yvirlæknar. Men tað mesta av tíðini, hevur hin yvirlæknin verið leysur vikarur.

Sostatt hevur Steinø verið einasti fasti yvirlækni í langa tíð og tá ið hann fer frá um eini fýra, fimm ár, er vandi fyri beinleiðis læknakreppu á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Hann visti ikki, hvat kann gerast fyri at bøta um viðurskiftini.

Men hann segði, at okkurt bendi á, at lønin, sum ein lækni í Suðuroy fekk, var ikki serliga lokkandi.

– Læknatrot er ein trupulleiki, sum eisini onnur kenna til. Summastaðni í Noregi hava tey roynt at lokka læknar til við at bjóða teimum hægri løn og skattafyrimunir. Men tað ber ikki til, tí Suðuroyar Sjúkrahús kann ikki bjóða læknunum annað enn sáttmálasettu lønina.

Tað kann eisini vera, at tað fakliga ikki er nóg avbjóðandi, men tað ber til at seta tiltøk í verk fyri at gera tað meiri lokkandi. Eitt nú er skipan sett í verk, so at Suðuroyar Sjúkrahús hevur álinjusamband við hjartalæknan á Landssjúkrahúsinum, so at hann alla tíðina kann fylgja við einum hjartasjúklingi á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Eitt annað tiltak kundi verið at talgilda røntgenkanningarnar, so at sjúkrahúsið í Suðuroy kundi tikið røntgenmyndir og sent tær beinleiðis til ein serlæknakanska heim til hansara, tá ið hetta er um náttina, og so kann hann beinanvegin geva uppskot um viðgerð.

Upplýst varð, at tað kostar 10 milliónir at talgilda røntgenkanningarnar á øllum teimum trimum sjúkrahúsunum.

### Tvíhalda um sjúklingar

Kristian Magnussen, løgtingsmaður, vísti á, at skal fólk støðast á bygd, er tað neyðugt at tað eru størv úti á bygd til útbúgvin fólk.

– Læknar og onnur við góðum útbúgvingum eru ofta gift við fólki, sum eisini hava góðar útbúgvingar. Og tað nyttar ikki at arbeiði bara er til annan hjúnafelagan og tí er neyðugt at skipa størv úti um landið til vælútbúgin fólk, so at bæði hjúnini kunnu fáa arbeiði, segði Kristian Magnussen.

Karl Leo Johannsen spurdi, hví tað er so trupult at sjúklingar av Landssjúkrahúsinum til Suðuroyar at fáa viðgerð, tá ið bíðilistarnir eru so langir í Havn.

– Hetta verður gjørt í lítlan mun og á Suðuroyar Sjúkrahúsi er onki, sum forðar hesum, upplýsti fyristøðumaðurin á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Men samstundis varð upplýst, at tað vísir seg at vera trupult hjá Sjúkrahúsum at sleppa sjúklingunum, tí nógvir sjúklingar geva góð hagtøl og góð hagtøl geva hægri játtan…

Sum tað sæst á grein aðrastaðni í blaðnum, er støðan ikki mætari hvat kommunulæknum viðvíkur.

# Samhaldsfasti hækkar eftirlønina

**Frá 1. januar komandi hækkar útgjaldið úr Samhaldsfasta Arbeiðsmarknaðareft irlønargrunninum til 680 krónur, ella 8.160 krónur um árið**

PENSJÓN
*Tíðindaskriv*

Stýrið fyri Arbeiðseftirlønargrunnin hevur á fundi 27/09 2002 samtykt at hækka eftirlønina úr grunninum við umleið 5% frá 1. jan 2003, soleiðis at eftirlønin verður 680 kr um mánaðin, sum er 8.160 kr um árið. Ásetingin er galdandi fyri árið 2003. Øll, sum hava fylt 67 ár, fáa eftirløn úr grunninum.

Løgtingslógin um eftirlønargrunnin er frá 1991, men hon er broytt nakrar ferðir. Lógin ásetir, at stýrið fyri grunnin skal áseta útgjaldið eina ferð um árið fyri álmanakkaárið eftir.

Lønmóttakarar og arbeiðsgevarar hava síðan 1. januar 1992 goldið í grunnin, lønmóttakarar 1/2 % av lønini so hvørt, hon er útgoldin, og arbeiðsgevarar 1/2% av lønunum í undanfarna ári. Eitt ársinngjald frá 1. apr 1993 - 31. mar 1994 er sambært lógarbroyting latið arbeiðsloysisskipanini sum veiting.

Eftirlønarveitingin er ásett soleiðis, at grunnurin sleppur undan at lækka hana seinni, og í staðin fyri hevur møguleika fyri at lata eina vaksandi upphædd, sum í minsta lagi veksur líka nógv sum inflatiónin.

Reglurnar um útgjald úr grunninum eru ásettar í løgtingslóg nr 39 frá 07.05.1991, sum seinast broytt við løgtingslóg nr 43 frá 09.05.1997 og í kunngerð nr 44 frá 09.05.1997. Eftir hesum reglum er tað Toll- og Skattstovan, sum stendur fyri útgjaldinum, og hvønn mánað setur veitingina á konto hjá hvørjum eftirlønarmóttakara í sparikassa, banka ella postgiro.

# Nýtt tilfar í støddfrøði til yngru børnini

UNDIRVÍSING
*Tíðindaskriv*




TALBÓK ætlað fyrsta flokki sum ískoytistilfar í undirvísingini í støddfrøði, er nú komin í bókabúðirnar. Høvundur er Katrin Gullbein, lærari. Astrid MacDonald hevur gjørt tekningarnar í bókini.

Bókin gevur næm-ingin-um møguleika at arbeiða miðvíst við tølunum 1-100. Talbókin er í trimum pørtum:

Fyrsti partur, tølini 0-9, er væl hóskandi í byrjanarundirvísingini, tá ið dentur verður lagdur á at venja talskriving, tøl og mongdarlæru.

Annar partur, tølini 10-100, stuðlar somuleiðis mongdarlæru og talvenjing.

Hóskandi er at fara undir henda partin, tá ið næmingarnir hava lært tey smærru tølini.

Triði partur, tær seinastu 13 síðurnar, eru verklig evni, sum flokkurin kann arbeiða við í stutt ella long tíðarskeið. Næmingarnir loysa uppgávurnar í felag.

Føroya Skúlabókagrunnur gevur út. Repro og prentumsiting hevur Repro-Z staðið fyri. Ingi Joensen, Grafik Studio, gjørdi permuna.

TALBÓK er 64 blaðsíður og kostar 48,00 kr.

PLUSSBÓK er nú komin í bókabúðirnar. Høvundur er Katrin Gullbein, lærari.

Hetta er annað heftið til byrjanarundirvísing í støddfrøði, sum Føroya Skúlabókagrunnur gevur út í ár.

PLUSSBÓK er ískoytistilfar og kann brúkast, tá ið tørvur er á at læra og venja at leggja saman. Dentur verður lagdur á, at næmingarnir læra seg at seta tøl og stykki vakurt og greitt upp.

Fyrra helvt av bókini er samanlegging við tølum minni enn 10. Í seinnu helvt, tølini omanfyri 10, eru einfaldar roknivenjingar at leggja tøl saman við serligum denti á at rokna við mentu.

Repro og prentumsiting hevur Repro-Z staðið fyri. Ingi Joensen, Grafik Studio, gjørdi permuna.

PLUSSBÓK 24 blaðsíður og kostar 28,00 kr.

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út telduforritið »Rokna« til yngru børnini. Andrias Hammer hevur forritað, teknað og sett upp. Hetta er eitt undirvísingarforrit í støddfrøði til skúla- og heimabrúks ætlað børnum 6 - 10 ár. Børnini kunnu venja:

- at telja
- at seta tøl í rætta raðfylgju
- at leggja saman
- at draga frá
- at tekna mynstur og at spegla

Telduforritið »Rokna« kann keypast í bókabúðunum fyri 149,00 krónur til hvønn brúkara.

Nýtsluloyvi til skúlar og til fleiri brúkarar kunnu bara keypast frá Bókamiðsøluni.



# Ongin kommunulækni í Suðuroy um fýra ella fimm ár

**Støðan viðvíkjandi kommunulæknum í Suðuroy, hevur verið góð, men taðer sum eitt korthús, sigur Karl Johan Fossá, kommunulækni á Tvøroyri**

LÆKNANEYÐ
*Áki Bertholdsen*



*– Støðan hjá kommunulæknunum í Suðuroy er sum eitt korthús, tí tað skal ómetaliga lítið til, so rapar alt húsið, segði Karl Johan Fossá, kommunulækni á Tvøroyri við Løgtingið seinasta mikukvøld*

Hendir onki sum munar, er lætt at síggja fyri sær, at um fýra ella fimm ár er ongin kommunulækni eftir í Suðuroynni.

Eins og Knud Steinø gjørdi tað í aðrari grein her í blaðnum, greiddi Karl Johan Fossá Løgtinginum frá støðuni viðvíkjandi kommunulæknunum í Suðuroynni.

Umstøðurnar hjá læknunum vóru góðar, tí teir høvdu nýggj høli, telduútbúnað og annað, sum kravdist.

– Tað hava verið fýra kommunulæknar, tveir á Tvøroyri og tveir í Vági og tað hevur gingið væl, segði Karl Johan Fossá.

Men nú er tann eini læknin í Vági farin og hin er í feriu. Annar læknin á Tvøroyri fær ikki gingi vakt í løtuni, so nú í fleiri dagar er Karl Johan Fossá einsamallur á vakt.

Hann hevur skilt, at læknin, sum er eftir í Vági, ikki er hugað at halda fram, verða umstøðurnar ikki nóg góðar at arbeiða undir og tað stendur ikki á at fáa arbeiði aðrastaðni.

Báðir kommunulæknarnir á Tvøroyri eru farnir um tey seksti. Tað er ikki óvanligt, at læknar fara frá við eftirløn 60 ára gamlir so tað kann vera so ógvuliga skjótt, at ongin kommunulækni er eftir í Suðuroy.

– So hóast støðan er góð, tá ið fýra læknar eru, er tað sum eitt korthús, tí tað skal ómetaliga lítið til at alt húsið rapar.

Tað hevur til tíðir gingið strilti at manna størvini í Vági – í hvussu so er tað eina og tað er trupult at fáa kommunulæknar hendavegin.

Fer fyrst ein lækni, er tað skjótt at ein annar ikki vil vera longri, tí so verða. umstøðurnar ov vánaligar og sum tað sær út í løtuni, verður tað skjótt, at ongin kommunulækni verður í Suðuroynni um, verða tiltøk ikki sett í verk, sum gera tað meiri lokkandi at koma út á bygd.

Hann vísti á, at tey, sum eru flutt aftur til Føroya, eftir tað stóru fráflytingina, eru ikki flutt út á bygd, men til Havnar.

– Skulu vit eisini framyvir hava kommunulæknar í Suðuroynni, verður neyðugt at seta tiltøk í verk, sum gera tað meiri lokkandi at búgva á bygd, segði Karl Johan Fossá, við løgtinslimir.

# Suðuroyar Sjúkrahús gongur nýggjar leiðir fyri at fáa lækna

**– Landskappingin í fótbólti gav leiðsluni á Suðuroyar Sjúkrahúsi hugskotið til at royna nýggjar leiði fyri at fáa lækna til sjúkrahúsið**

LÆKNANEYÐ
*Áki Bertholdsen*



*Ronnie Midjord bjóðar Edmundi Joensen, løgtingsformanni, vælkomnum á Suðuroyar Sjúkrahús mikukvøldið*

– Tað hevur verið heilt ómøguligt at fingið ein lækna á Suðuroyar Sjúkrahús afturat Læknanum sum er, Knud Steinø.

Hetta segði Ronnie Midjord, umsjónarmaður á Suðuroyar Sjúkrahúsi fyri løgtingslimum, tá ið tey vitjaðu Suðuroynna mikukvøldið og hósdagin í farnu viku.

Hann segði, at tey høvdu søkt og søkt, men ongar umsóknir komu, so enn var Knud Steinø einsamallur við teimum leysu vikarunum, sum tað eydnaðist at finna.

Hann segði, at Sjúkrahúsið tí hevði gjørt av at ganga nýggjar leiðir og so mátti tíðin vísa, um tað fór at eydnast.

Hugskotið hevði hann fingið úr fótbóltinum.

– Tað eru nógvur jugoslavar í Føroyum og sparka, so tey fóru at kanna, um tað ikki eisini var áhugi hjá onkrum lækna at koma hendavegin.

### 19 umsóknir

Suðuroyar Sjúkrahús søkti tí eftir lækna í Jugoslavia og upp á 14 dagar fingu tey ikki færri enn 19 umsóknir.

Ronnie Midjord sigur, at áhugin hjá læknum í Jugoslavia at sleppa burtur er ikki óskiljandi, tí ársølnin hjá einum lækna har er ikki meiri enn 24.000 krónur í okkara peningi.

Hann sigur, at leiðslan á Suðuroyar Sjúkrahúsi nú hevur valt ein umsøkjara burturúr og í løtuni verður arbeitt vit at fáa heilsustýrið í Danmark at góðkenna hann so at hann kann fáa loyvi at virka sum lækni.

Tað skiltist á fyristøðumanninum at tað var við at koma undir land.

Verður læknin góðkendur, er er ætlanin fyribils, at hann skal vera í Suðuroyar Sjúkrahúsi í ein mánað fyri at vita um hetta er tað rætta fyri báðar partar.

So verður støða tikin til um hann skal verða verandi, ella ikki, sigur Ronnie Midjord.

Annars var Ronnie Midjord fegin fyri teir vikarar, sum hava verið, tí yvirhøvur eru hetta somu læknar, sum koma aftur og aftur og teir kenna tí bæði sjúkrahúsið og viðurskiftini annars.